# ÍF gjørdi besta hálið

**Bæði móti Mjølni og SÍ sýndu fuglfirðingar sannførandi spæl, og við tveimum 3-0 sigrum eru teir nú á odda í bestu mansdeildini, og í Sørvági vann Fram á steypavinnarunum úr SÍ**

MANSFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fuglfirðingar bíðaðu í spenningi, nú ÍF eisini kom við í kappingini í meistaradeildini hjá monnum. Fyrsta vikuskiftið hevði liðið annars hugt at frá síðulinjuni, meðan hini fýra liðini opnaðu kappingina, men nú skuldi tað so verða teirra tørn.

Og spenningurin mundi ikki gerast minni av, at tað vóru Mjølnir og SÍ, sum hesaferð komu á vitjan. Hesi bæði liðini teljast saman við júst ÍF og so Fram millum liðini, sum kunnu væntast at gera seg galdandi í ár, og tí kundu dystirnir um vikuskiftið kanska geva eina ábending um, hvussu ymsu liðini eru fyri, nú kappingin av álvara er farin ígongd.

### Breiddin avgerandi

Og skal metast eftir teimum báðum fyrstu heimadystunum hjá ÍF, so er einki at ivast í, at teir eiga at vera fremstu gullavorittarnir í ár. Tað er kanska ikki haldbart at tosa um favorittar longu nú, tá bert tvey vikuskifti eru liðin av eini langari kapping, men talan var í báðum førum um sera sannførandi sigrar hjá fuglfirðingunum.

Serstakliga í fyrsta settinum í báðum dystunum var talan mest sum um avgreiðsluspurning, og tó at talan eftir hetta gjørdist um javnari dystir, so prógvaðu fuglfirðingarnir hvørja ferð, at tá tað veruliga stóð á, so megnaði liðið at lyfta seg, soleiðis at seinastu og avgerandi bóltarnir kundu sláast heim.

At peika á nakra einstaka orsøk til tryggu sigrarnar er ikki serliga einfalt, men fremsta orsøkin tykist vera, at fuglfirðingar eiga eina nógv størri breidd í spælinum, enn mótstøðuliðini. Avrikið er ikki á sama hátt tengt at, hvussu ein ella tveir leikarar standa seg, og tá liðið telur fleiri møguligar match-vinnarar er eisini mundandi torførari hjá mótsøðuini at stilla blokkin, so hesin ger størstu nyttuna.

Júst hetta tóktist eisini vera trupulleikin hjá Mjølni og kanska serliga sørvingum. Í ov stóran mun verður spælið lagt eftir einum ella tveimum leikarum, og tó at útlendsku kreftirnar til tíðir eru mest sum ógjørligar at steðga, so er hetta sjáldan nakað, sum røkkur ígjøgnum ein heilan dyst, og enn minni ígjøgnum eitt heilt kappingarár.

Sum sagt, so er dekan ov tíðliga at fara at rópa nakrar favorittar fram longu nú, og kappingin í fjør sýndi eisini, at einki er liðugt fyrr enn alt er liðugt, sum onkur væl kendur politikkari plagar at siga. Men við tveimum sigrum á tveimum av fremstu sambiðlunum til gullmerkini syrgdu fuglfirðingar í øllum førum fyri, at teir hava fingið eina flúgvandi byrjan upp á kappingarárið.

### Meistararnir reistust

Meistaraliðið úr Fram var fyri greiðum tapi, tá teir fyrsta umfarið vitjaðu í Klaksvík, har Mjølnir í ár hevur eitt sera sterkt lið.

Hesa ferð skuldi slagið standa í Sørvági, har SÍ afutr í ár tykist ætla sær ein leiklut í oddinum, og nú gekst nakað væl betri hjá Fram.

Talan gjørdist um ein samlaðan 3-0 sigur, men hóast hesin ljóðar tryggur, so var talan yvir høvur um ein sera javnan dyst. Munurin millum liðini bæði var ongan tíð serliga stórur, men tað vóru teir úr Fram, sum áttu munin.

Sum heild, so boða úrslitini higartil í flogbóltinum frá, at vit aftur í ár kunnu rokna við eini sera spennandi kapping. Fleyr tykist vera einasta liðið, sum ikki megnar at spæla við í oddinum, og sum hini liðini eru fyri, so er spurningurin helst, hvørt havnarmenninir yvir høvur fara at vinna sær nakað stig.

Hinvegin er líkt til, at hini fýra øll kunnu taka stig frá hvørjum øðrum. Kanska er ÍF í løtuni besta boðið upp á ein meistara, men hinvegin eru bert tvær vikur síðani, at teir taptu hálvfinaluna í FK-kappingini, so alt í alt kunnu flogbóltshugað kring alt landið gleða seg til enn eitt spennandi kappingarár, har tað væl kann henda seg, at einki er avgjørt fyrr enn seinastu bólturin er sligin í gólvið.



*Fuglfirðingar fingu eina framúr góða byrjan upp á landskappingina, tá teir leygardagin bastu Mjølni, fyri síðani at fylgja upp við enn einum 3-0 sigri, tá SÍ vitjaði sunnudagin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Úrslit, meistaradeild menn

**ÍF-Mjølnir 3-0** (25-14, 25-22, 25-17)
**ÍF-SÍ 3-0** (25-12, 25-21, 25-21)
**SÍ-Fram 0-3** (21-25, 19-25, 22-25)

# Gott fólk á øllum plássum

**Rúni Weihe sigur breiddina vera eina av avgjørdu styrkunum hjá ÍF, men enn vil hann als ikki tosa um nakran favoritt av nøkrum slag**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Einki er at ivast í, at ein av orsøkunum til góðu byrjanina hjá ÍF er, at Rúni Weihe í ár hevur valt at spæla við fuglfirðingunum. Ársins leikari seinasta kappingarár hevði annars vónir um at royna seg sum yrkisleikara, men hetta er fyribils lagt á hillina, og tað munnu í øllum førum fuglfirðingar fegnast um.



*- Vit hava kanska fingið eina góða byrjan, men enn er tað dekan ov tíðliga at rópa okkum fyri favorittar ella nakað líknandi, heldur Rúni Weihe*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Fáir veikleikar

Eftir báðar sigrarnar um vikuskifitð fingu vit orðið á Rúna, og tó at hann ásannaði, at teir nú høvdu fingið eina góða byrjan, so dugdi hann ikki rættiliga at siga orsøkina til hetta.

- Tað er nokk fyrst og fremst tað, at vit eru sera væl fyri. Venjingarnar byrjaðu tíðliga, og tó at spælið kanska kundi verið betri – serliga sunnudagin – so hevur tað gingið á eini leið. Ikki minst tí vit á liðnum hava gott fólk á øllum plássum, soleiðis at talan ikki verður um nakað veikt punkt.

- Tað er tó einki at ivast í, at hini liðini fara at koma væl við. Mjølnir hava enn ikki fingið veruligt glið á sítt spæl, men teir hava sera sterkt fólk í ár. SÍ var kanska nokk so skert, nú Raiko sat uttanfyri móti okkum, og so er tað eisini Fram. Teir skulu helst gera nakrar umstillingar. Millum annað tí eg sjálvur havi skift felag, men teir hava framvegis eitt sera gott lið, og eg ivist ikki í, at eisini teir fara at gera um seg. Einasta liðið, sum eg ikki rokni við kann gera seg galdandi, er Fleyr, og so verður restin ein dystur millum hini fýra. Vit hava kanska fingið eina góða byrjan, men enn er tað dekan ov tíðliga at rópa okkum fyri favorittar ella nakað líknandi, heldur hann.

### Dovna ov tíðliga

Hóast hann letur væl at byrjanini, so heldur Rúni sjálvur, at spælið hjá ÍF væl kundi verið betri í teimum báðum dystunum, sum liðið spældi um vikuskiftið.

- Í báðum førum spæla vit eitt sera gott fyrsta sett, har tað bert er ein spurningur um tíð, áðrenn vit vinna. Tað ger ofta, at tú ótilivitað tekur tað meira róligt, og tað haldi eg eisini hendi hjá okkum. Tíbetur megna vit kortini at halda fast, men tað kann vera vandamikið, um tú soleiðis tekur tær av løttum, og tað er so avgjørt nakað, sum vit skulu betra.

- Og so skulu vit ikki gloyma, at hjá flestu liðunum hevur talan verið um fleiri broytingar í ár. Um ein mánað ella so er spælið uttan iva betri hjá øllum pørtum, og tað er jú ikki fyrr enn í endaspælinum, at avgerðirnar fella, so eg ivist ikki í, at talan verður um eina sera spennandi kapping. Megna vit at lyfta okkara spæl, so kunnu vit væl vera við allan vegin, men hinveign, so sýndi kappingin í fjør, at einki er avgjørt fyrr enn til allar seinast, so tað ræður um at halda kósina allan vegin, sigur Rúni Weihe at enda.



# Trý um boðið

**Eftir dystirnar um vikuskiftið er líkt til, at tað fyrst og fremst verða Mjølnir, TB og ÍF, sum í ár fara at kappast um fremstu sessirnar**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fýra dystir vórðu leiktir í meistaradeildini hjá kvinnum hetta vikuskiftið, og bæði Mjølnir og TB vóru tvær ferðir í dysti.

Burtur úr hesum fingu tvørakvinnur seks stig, og vóru tí treytalest tær, sum fingu mest burturúr.

Hetta mundi ikki kennast sørt hugaligt, eftir at tær fyri viku síðani vóru fyri tapi í sínum fyrsta dysti, sum var ímóti ÍF. Júst ÍF mátti hetta vikuskiftið lúta fyri Mjølnir, sum aftur mátti lúta fyri TB, so tað er nógv, sum bendir á, tað fyrst og fremst verða hesi trý liðini, sum fara at dystast í ovara enda av stigatalvuni hetta kappingarárið.

### ÍF koppaði

Leygardagin hevði TB vitjan av Fleyr, og her var ikki nakar sum helst ivi um, hvat av liðunum var tað sterkara. Fleyr hevur seinnu árini havt ilt við at átaka sær nakran leiklut í føroyska hondbóltsoddinum, og avrikini higartil geva millum liðini, og sum skilst á lagnum, so var talan um ein bæði spennandi og harðan dyst.

ÍF hevur í ár styrkt um liðið við tveimum jugoslaviskum leikarum, og tað vóru eisini fyrst og fremst hesar báðar, sum gjørdu um seg. Blokkurin hjá Mjølnir hevði tí úr at gera, og tað var eisini her, at dysturin fyrst og fremst varð vunnin.

### Leygardagurin merktist

Sunnudagin vóru so aftur tveir dystir á skránni. Á Giljanesi tók Dráttur ímóti uppflytarunum úr KÍF. Her varð ikki roknað við, at KÍF kundi gera stórvegis skreytir, men tað var tó um reppið, at tær tóku øll á bóli.

Eftir at Dráttur hevði byrjað soleiðis, sum roknast kundi við, tók KÍF sær lítlar ábendingar um, at nøkur broyting er ávegis. Tilsamans vunnu havnarkvinnurnar bert 31 bóltar ímóti TB, sum sostatt kundu fara púrasta ómøddar norður til Klaksvíkar, har tær dagin eftir skuldu royna seg móti Mjølni.

Tað sama kann ikki sigast um Mjølnir, sum høvdu eina tunga uppgávu á Kambsdali, har ÍF tók ímóti. Tá avtornaði, so hevði Mjølnir vunnið ein sera harðan dyst 3-2. Settúrslitini boða frá, at tað alla tíðina var sera tætt gjørdist tað so TB, sum dró longra stráðið.

Tað var kanska soleiðis, at dysturin frá leygardegnum framvegis sat í beinunum hjá Mjølni, sum hevði ilt við at fáa sama glið á spælið, sum tær høvdu leygardagin. Sagt verður, at tað fyrst og fremst vóru móttøkurnar, sum ikki sótu nóg væl, og tað hevði sjálvandi ávirkan á álopsspælið.

Og tað at móttøkurnar ikki rigga, gerst ikki órevsað móti TB. Við leikarum sum teimum báðum Popovic-systrunum og heimum reiggj, og vunnu tær bæði næsta og triðja settið. Trýstið gjørdist tó ov stórt hjá kollfarðakvinnunum. Fjórða setti vann Dráttur hampuliga trygt, og tá fimta og avgerandi settið stóð fyri, var eingin ivi, soleiðis at Dráttur vann hetta 15-6.

Varð roknað við, at talan skuldi vera um avgreiðsluspurning á Giljanesi, so var spenningurin tað størri undan dystinum hjá TB í Klaksvik. Ikki minst eftir at Mjølnir hevði vunnið í Fuglafirði, men hesaferð afturkomnu Gudrid Nolsøe, verða slík mistøk revsað uttan náði, og so hjálpti tað lítið í samlaða roknskapinum, at Mjølnir í løtum var væl við. Tað eru settini sum telja, og her vann TB tey trý.

### Verður dagsformurin

Sum sagt í byrjanini, so er tað nú líkt til, at tað serliga verða Mjølnir, ÍF og TB, sum fara at stríðast um heiðursmerkini í vetur. Nú tey øl hava leikt sínar fyrstu innanhýsis dystir, er støðan tann, at tey hava vunnið ein og tapt ein, og í so máta er einki avgjørt enn.

Talan er eisini um trý lið, sum øll hava sínar avgjørdu styrkir, og tí er væl hugsandi, at tað verður dagsformurin í einstøku dystunum, sum verður avgerandi fyri, hvar gullmerkini fara. Og fyri undirhaldsvirðið í kappingini er tað so avgjørt ikki ringasta støðan.



*TB vann týdningarmikla útidystin í Klaksvík, og hetta ber við sær, at støðan í oddinum er púrasta jøvn, nú trý tey fremstu liðini hava leikt fyrsta umfarið í innanhýsis uppgerðunum*
*Mynd: SáH*



*Ivaleyst var tað ein fyrimunur hjá TB, at tær høvdu ein hampuliga lættan heimadyst undan ferðini til Klaksvíkar*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

## Úrslit, meistaradeild kvinnur

**ÍF-Mjølnir 2-3** (23-25, 27-25, 25-11, 24-26, 13-15)
**TB-Fleyr 3-0** (25-7, 25-11, 25-15)
**Mjølnir-TB 1-3** (24-26, 20-25, 25-18, 13-25)
**Dráttur-KÍF 3-2** (25-13, 17-25, 23-25, 25-15, 15-6)

# Sámal Erik heldur fram

Argja Bóltfelag, AB, tryggjaði sær í ár fyri fyrstu ferð í søgu felagsins uppflyting til næstbestu røðina hjá monnum, og tó at eingin sigur tað hart, so er tað helst eingin loyna, at Argjamenn droyma um at sleppa enn longur upp.

Fyrireikingarnar til komandi kappingarárið eru eisini langt síðani farnar ígongd, og nú hevur felagið eisini tryggjað sær venjaran til komandi kappingarárið. Tað verður nevnliga aftur í ár Sámal Erik Hentze, sum fer at standa við stýrisvølin. Sámal Erik, sum er 30 ára gamal taldist seinast í áttati- og fyrst í nítiárunum millum mest evnaríku leikararnar í HB, men millum annað orsakað av skaðum, rukku fótbóltsevnini ongan tíð so langt, sum útlit annars vóru fyri.

Ístaðin valdi hann fyri tveimum árum síðani at royna seg sum venjari, og eftir at tað gekk so hampuliga væl við næstbesta liðnum hjá HB fyrrárið, gjørdist hann í fjør venjari hjá AB, og higar til hava úrslitini so í øllum førum verið góð.

-jm